Hósdagin 17. november 2011 kl. 11.00 varð útskiftingarfundur settur í "Virkinum" á Sandi at viðgera uttangarðsútskifting av hagapartinum

**Fjalshagi**
**Norðastipartur**
**matr.nr. 27-388**
**Sands bygd**

| | |
|---|---|
| Nevndin møtti fullmannað: | Petur Nielsen, formaður<br>Jákup Skoradal<br>Eyðfinnur Hansen |
| Frá Umhvørvisstovuni: | Jógvan Frýdal<br>Óli Johansen |
| Á fundinum møttu | Jógvan Nicodemussen<br>Páll á Reynatúgvu,umboðaði við fulltrú eisini Kristinu á Reynatúgvu<br>Gunnar Bjarnason, umboðaði við fulltrú Jónu Kristinu Joensen<br>Harald Jensen<br>Rólant Vidtfeldt<br>Jákup Joensen, umboðaði við fulltrú Jónu Kristinu Joensen |

Fram varð lagt:

Skjal 1. Lýsingar í dagbløðunum Dimmalætting og Sosialinum, á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og á bygdarráðsskrivstovuni.

Fundurin er soleiðis lógliga lýstur og settur.

Skjal 2. Bræv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 3. nov. 2010, har Petur Nielsen er uppnevndur sum formaður fyri uttangarðsútskiftingarnevndina viðvíkjandi Fjalshaga, Norðastaparti.

Skjal 3. Uppnevning av nevndarlimum. Við skrivi dagfest 6. juni 2011 hevur formaðurin biðið rættin uppnevna nevndarlimir, og tað hevur rætturin gjørt tann 7. juli 2011:

| | |
|---|---|
| nevndarlimir: | 1. Olaf í Garði Joensen, Eiði<br>2. Jákup Skoradal, Norðoyri |
| tiltakslimir: | 1. Tróndur Niclassen, Bøur<br>2. Joan Michelsen, Froðba<br>3. Eyðfinnur Hansen, Klaksvík<br>4. Jytte Juul, Funningur |

Gegnið hjá nevndarlimunum er kannað. Olaf í Garði bar seg undan at vera nevndarlimur í hesum máli, tí hann metir seg ógegnigan. Í hansara stað er Eyðfinnur Hansen komin í nevndina. Nevndarlimirnir vita seg ikki vera skyldar ella svágdar við nakran eigara í Fjalshaga, Norðastaparti, á Sandi so at tað nemur gegni teirra sbr. § 8, stk. 5 í útskiftingarlógini.

> Formaðurin og nevndarlimirnir hava áður undirskrivað váttanina um: *At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevndarlimur, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum*.

Eingin mótmælti samansetingini av nevndini.

Skjal 4. Grannastevnuviðtøkan frá 12. febr. 2009 varð framløgd.

Vísandi til grein 10 í útskiftingarlógini vórðu teir spurdir, sum løgdu málið fyri á grannastevnu, um teir nú taka málið aftur. Hetta varð svarað noktandi.

Formaðurin greiddi frá mannagongdini við útskiftingini.

Síðani varð útskiftingarkravið viðgjørt.

Tá málið varð lagt fyri á grannastevnu 12. febr. 2009 varð skoytt upp í útskiftingarkravið eitt ynski um, at hagin verður býttur soleiðis, at parturin hjá matr. nr. 287a (1 mk 7 gl 13⅓ sk, eigarar Páll og Kristina á Reynatúgvu) verður býtt burturúr og fær tann partin av haganum, sum er eystanfyri landsvegin og ein geira vestanfyri Norðara Hálsavatn og norður móti Skopunarhaga. Harafturat skal vetrarbitið á gerðunum eystan fyri landsvegin avloysast. Hesin frábýtti partur av Fjalshaga skal eftir ætlan brúkast til golfbreyt. Seyðurin – 35½ frælsi, sum er parturin hjá matr. nr. 287a av verandi skipan, er longu avtikin.

**Jógvan Nicodemussen**, eigari og røktingarmaður, greiddi frá haganum:

Skipanin var 165 áseyð, og tá er roknað við 30 í røkt. Fylgini eru trý: Tær heimaru (55), Gomlugimbrar (60) og Fulltúgvuseyður (50). Lendið undir vegnum er í stóran mun gamlir torvheiðar, sum í nýggjari tíð eru fyltir upp og taðaðir. Stórt felli er av landsvegnum, og hvørt ár doyggja einir 6-8 seyðir av ferðsluni. Samanumtikið helt hann tað verða haganum til stórt gagns, um matr. nr. 287a verður býtt burturúr og fær lendið niðanfyri vegin. Stikast skal so fram við vegnum, og skipanin minkast við teimum 35 frælsunum hjá matr. nr. 287a.

Besta øki oman fyri vegin er lendið niðan frá Hálsavøtnum og norður móti Skopunarhaga. Tað hevur áður verið upp á tal, at matr.nr. 287a verður býtt burtur úr haganum og fær júst hetta lendið. Seyðurin krokar oman fyri vegin.

**Gunnar Bjarnason** las upp skriv, sum varð handað nevndini. Eigararnir av matr. nr. 59a, 142a, 145 og 147a góðtaka ikki, at hagin teir eru partur av, og sum eftir verður, tá parturin hjá matr. nr. 287a er býttur frá, missir lutfalsliga stóran part av lægra lendinum. Heldur ikki góðtaka teir, at vetrarbitið innangarðs verður skert lutfalsliga nógv. Hesar ognir verða eftir eina møguliga útskifting verri fyri at gagnýta møguleikarnar í § 34 í hagalógini, og tær fáa alt traðkið, tá seyðurin fer at rása millum hagan og traðirnar. Gunnar vísti eisini á, at í ringasta veðri vetrartíð krokar allur seyðurin við Pætursheyggj.

**Jákup Joensen** tók undir við tí, Gunnar bar fram.

**Páll á Reynatúgvu** vísti á, at um matr. nr. 287a fær tað, sum liggur í uppskotinum, er hetta væl minni enn teirra ognarpartur í haganum. Hetta er eitt alternativt uppskot í mun til vanligt brúk og rakstur av haga. Eyðvitað skulu umleggingar til eisini innangarðs viðvíkjandi vetrarbiti, og eitt nú má finnast ein loysn á, hvussu seyðurin ræsir um traðirnar, sum ikki verða við í verkætlanini (sí omanfyri).

Aðrir høvdu eisini orðið, og menn vóru á einum máli um, at seyðurin er munandi betri fyri, nú skipanin er minkað.

Fundurin varð nú slitin, og formaðurin boðaði frá, at hann verður uppaftur tikin kl. 13.15.

Saman við flestu fundarfólkunum varð nú farið inn í hagan. Steðgað varð á á landsvegnum undir Økslini, við Krókafossar og norðuri við Hálsavøtn.

Komin aftur heim í ungmannafelagshúsið Virkið tók nevndin samanum. Semja varð um hesa niðurstøðu:

Nevndin er ikki sannførd um, at tað er í samsvar við andan í útskiftingarlógini at býta Fjalshaga, Norðastapart, soleiðis at økið niðan fyri landsvegin og ein geiri omanfyri verða frábýtt sum ogn hjá matr.nr. 287a at brúka til golfvøll. V.ø.o. at materiell heimild er eingin í útskiftingarlógini fyri slíkum býti.

Nevndin heldur, at brúkið av haganum og ein møgulig broyting í eigaraviðurskiftunum kann verða loyst í semju við sáttmála eigaranna millum, sum útskifting í semju eftir kap. 12 í útskiftingarlógini ella sum sundurbýtismál eftir matrikullógini. Ansast skal eftir, at eigarheimildirnar eru í lagi, og náttúrufriðingarmyndugleikarnir og Landsverk skulu upp í part, um talan verður um frábýti fram við ánni og landsvegnum.

Kl. 13.20 varð fundurin uppaftur tikin. Fundarfólkið varð hitt sama sum fyrrapartin, tó møtti Rólant Vidtfeldt ikki.

Formaðurin boðaði frá, at útskiftingarnevndin er samd um ikki at fremja útskiftingina, og vísti til grundgevingarnar, sum nevndar omanfyri.

Málið er við hesum endað, og eigararnir hava 3 mánaðar freist at leggja úrskurðin fyri Yvirútskiftingina v/ Sorinskrivarin, C. Pløjensgøta 1, 100 Tórshavn.

Útreiðslurnar, sum staðist hava av útskiftingararbeiðinum, og sum ikki verða bornar av landskassanum, verða smb. § 60 í útskiftingarlógini lutaðar út á teir eigarar, sum løgdu kravið um útskifting fyri á grannastevnu.

Fundurin lokin.

Petur Nielsen Jákup Skoradal Eyðfinnur Hansen